# Føroyskt snið í Keypmannahavn

**Føroysk ull í sýnisgluggum í Keypmannahavn. Durita Petersen hevur latið upp handil, har hon millum annað selur frakkar og troyggjur frá Sirri og PAU.**

*Marjun Dalsgaard*

Útflyting av klædnavørum er ikki tað føroyingar eru mest kendir fyri, men gongur tú eftir Jernbane Allé í Vanløse sært tú eina heimliga verð millum fjølbroyttu sýnisgluggarnar á leiðini. Her hava teir vælkendu jakkarnir, tøvdu skógvarnir og húgvurnar frá Sirri og PAU funnið sær ein fastan bústað. "Dudas Verden" er ikki ein serstakt føroyskur handil, men kortini er ein serligur føroyskur dámur í hølunum, har myndlist við føroyskum motivum og málningar av sildberanum hanga millum niðurdeilar og jakkar úr tøvdari føroyskari ull.

Durita Petersen er sjúkrasystir, men hevur altíð havt ein dreym um at gerast sjálvstøðug. Smakk fyri handilsyrkinum fekk hon, tá hon fyri einum ári síðani forelskaði seg í nøkrum taskum í Nepal, sum hon tók við sær heim og seldi til vinir og kenningar. Eitt, tvey trý vórðu allar seldar, hon bílegði tí fleiri, og tær hanga nú millum føroysku vørurnar í hennara nýggja handli, Dudas Verden. Durita selur eisini hálsketur, oyralokkar og aðrir prýðislutir frá Zento og umhugsar at selja smúkkur frá kumkum, sum eru eittsindur dýrari og í stíli eitt millumting millum Dyrberg Kern og Pilgrim. Hon vil fegin hava ein fjølbroyttan handil og leitar eftir annaleiðis vørum, sum ein ikki sær í øðrum handlum. Um nakar hevur nakað, sum er eitt sindur ørvísi, sum tey sjálvi gera og ynskja at selja, eru tey vælkomin inn á gólvi, sigur hon. Hon hevur flest bundnar og heklaðar vørur, og hetta er júst tíðin til tað, tí binding og bundin pløgg er vorðið alt meira moderna millum danir, sigur Durita, sum saman við systrini eisini sjálv hevur bundið og heklað sjalir og turrikløð, sum verða seld í handlinum. Umframt at umboða Sirri og PAU selir hon taskur, sum føroyski sniðgevin Kristin Bæk hevur gjørt. Myndirnar, ið prýða hølini hevur danski grafikarin Ingrid Møller, sum hevur vitjað nógv Føroyum, gjørt.



*Ein sera spent Durita pakkar vørur út, sum just eru komnar úr Føroyum*

## Íverksetanarstuðul

Durita hevur ongar royndir innan handilsyrki, men hevur fingið sera góða vegleiðing, sum verður latin vegna danska statin gjøgnum "Erhvervsrådgivningen" í Keypmannahavn. Fyri at stuðla íverksetarum verður persónlig ráðgeving veitt, um tú til dømis fer í holt við at gerast sjálvstøðug handilskvinna. Hetta er gull vert, sigur Durita.

- Eg havi fyrr gingið á einum skeiði á VUC, har eg tók nøkur fak um rakstur av eini fyritøku, men hesum fekk eg einki burturúr, tí tað var alt ov breitt. Nýggja skipanin tekur støði í tær - hetta er persónlig ráðgeving, so tú fær hvørki meir ella minnni, enn tú hevur brúk fyri fyri at koma í gongd og hava ein nøkunlunda møguleika fyri at yvirliva, sigur Durita og leggur aftrat, at hon altíð kann venda sær til ráðgevan, um tørvur skuldi verið á tí.

Handilin liggur miðskeiðis í Vanløse, á handilsgøtuni, Jernbane Allé 73. Um tað eydnast Duritu at venja føroyingar við, at teir eisini kunnu keypa føroysk pløgg og annað her niðri, ger tað minni, at handilin ikki liggur mitt í Keypmannahavn, heldur hon. Prísurin liggur um tað sama sum í Føroyum, og hon hevur tax free. Durita hevur góðar vónir og heldur, at danir fara at taka væl ímóti føroysku sniðunum.

- Tey eru púra vekk í føroysku klæðunum, men skulu líka síggja tey ann, áðrenn tey keypa, tí tey liggja jú í dýrara endanum, sigur Durita, sum enn hevur selt mest av húgvunum og heimabundnu sjalunum. Umframt Sirri og PAU umhugsar hon at fáa samarbeiði í lag við aðrar føroyskar ullframleiðarar, eins og hun møguliga fer at selja føroyskt tógv og bindiuppskriftir um eftirspurningurin er nóg stórur. Fríggjadagin 9. oktober verða hennara vørur at síggja í Føroyahúsinum, tá Sirri og PAU standa fyri eini mótasýning í sambandi vid mentanarnáttina í Keypmannahavn.



*Barnaskógvar úr føroyum og taskur úr Nepal*



# Vakthavandi var ókunnugur við mannagongdina

**Tá alarmsentralurin sunnunáttina boðaði brandliðnum hjá Miðvágs- Sandavágs kommunum frá einum ferðsluóhappi í Vágum, visti viðkomandi, sum tók móti boðunum, ikki, hvat hann skuldi gera. Brandleiðarin hevði beint framman undan sagt seg úr starvi**

ALARMUR
*Edvard Joensen*



*Brandbilurin hjá Miðvágs-Sandavágs Sløkkliðið er sera væl utgjørdur. Men vakthavandi hjá sløkkiliðnum visti ikki, hvussu hann skuldi nýtast, tá brúk var fyri honum sunnunáttina*

*Mynd: Edvard Joensen*

Alarmsentralurin í Havn slapp ikki av við boðini um eitt ferðsluóhapp í Vágum á rættan hátt sunnunáttina. Viðkomandi, sum tók alarmtelefonina hjá brandliðnum á staðnum, visti ikki, hvussu hann skuldi bera seg at í slíkari støðu. Alarmsentralurin mátti ringja til fleiri telefonir eftir hjálp.

Jón Klein Olsen, varapolitiinspektørur, sigur, at alarmsentralurin sunnunáttina fekk fráboðan um, at ein bilur var farin út av Vatnavegnum í Vágum. Sagt varð, at tað var helst ikki álvarsligur skaði hendur.

Kortini vísti tað seg, at ein ung genta sat føst í bilinum og slapp ikki út.

## Ótryggur alarmur

Ringt varð til alarmtelefonina hjá brandliðnum á staðnum, sum er Miðvágs-Sandavágs Sløkkilið.

Ein løta gekk, áðrenn telefonin svaraði, greiðir Jón Klein Olsen frá. Vakthavandi horydi, at tað var ikki tann persónurin, sum vanliga plagar at taka hesa telefonina, sum hesaferð svaraði. Viðkomandi greiddi frá, at brandleiðarin hevði sagt seg úr starvi og hevði latið telefonina frá sær, og at hann, sum nú hevði telefonina, ikki reiðiliga visti, hvussu farast skuldi fram í slíkum føri.

Vakthavandi á alarmsentralinum vildi hava at vita, hvar klippiútgerð til slíkar støður var at finna. Maðurin, sum tók telefonina í Vágum, helt, at best var at royna flogvøllin.

Vaktahavndi ringdi til brandliðið á flogvøllinum og fekk at vita, at Vága Bjargingarfelag átti útgerðina. Síðan varð ringt til eitt telefonnummar, sum har var uppgivið. Bjargingarfelagið vísti aftur til sløkkiliðið í Miðvági/ Sandavági, tí útgerðin lá í brandbilinum har. Men hetta var sama nummar sum fyrr hevði verið ringt til, og hildið varð ikki, at har var meira at heinta.

Sjúkrabilurin í Vágum kom á staðið, og førararnir vistu um onkran, sum bæði koyrir sjúkrabil og er við í brandliðnum. Viðkomandi heðvi ikki vakt, men varð uppringdur, og kom saman við fráfarna brandmeistaranum skjótt eftir á staðið við sløkkiliðsbilinum, har millum annað klippiútgerðin lá í. Men tá hevði tað eydnast teimum, sum vóru á staðnum, millum annað løgregluni í Vágum, at fáa gentuna leysa og út úr bilinum.

Genturnar, sum vóru í bilinum, vórðu báðar við sjúkrabilinum fluttar á Landssjúrkahúsið til kanningar. Tær høvdu bert fingið smávegis likamligar snuddir.

## Avleiðingar

Óhepna støðan, sum kom í hesa náttina, kann í rignasta føri hava við sær, at Vágatunnilin verður stongdur, sigur leiðarin á Brunaumsjón Landsins, Petur á Lava Olsen.

– Men tá skal standa øgiliga illa til kortini, leggur hann afturat.

Vágatunnilin kemur upp í Sandavágs kommunu, sum hevur skyldu til at hava tilbúgving, sum kann klára einahvørja støðu, ið kann koma í. Bæði við eldi og øðrum vanlukkum. Og hevur kommunan ikki tað, sigur grein 13 í brunalógini, at hon kann kærast til landsstýrið, sum so ger av, hvat gerast skal.

Óhepna støðan sunnunáttina vísti, at tilbúgvingin riggaði ikki heilt sum fyriskrivað er. Og tað hava avvarðandi myndugleikar so tikið til eftirtektar.

Varabrandleiðarin, sum kommunurnar hava, er staddur uttanlands, og tí var tað ein annar persónur, sum ikki dagliga er beinleiðs knýttur at sløkkiliðnum, sum tók vakttelefonina.

Nú er ein brandmaður settur at taka sær av hesi vaktini, til varaleiðarin er afturkomin.

Fundarvirksemið hevur verið nógv hesar dagarnar, síðan óhappið á Vatnavegnum. Nógvar royndir eru gjørdar at loysa málið endaliga, men fyrrapartin hósdagin var eingin loysn funnin.

## Uppsøgnin

Fráfarni brandmeistarin í Miðvágs-Sandavágs Sløkkiliði arbeiðir sum skúlatænari við skúlan á Giljanesi.

Hann hevur leingi biðið um at fáa starvsviðurskiftini broytt soleiðis, at hann kann brúka ein part av arbeiðstíð síni til sløkkiliðið burturav. Viðlíkahald, venjing og slíkt, sum hoyrir til.

Sera rímilig krøv halda fleiri, sum hava við tilbúgving at gera. Men tað hevur ikki borið til at fingið eina poltiiska semju í bygdarráðunum báðum um hesi ynski.

Fyri drúgvari tíð síðan boðaði leiðarin so frá, at hann fór at leggja frá sær, tí hann metti tað ikki vera nøktandi, bert at hava sína frítíð til at røkja sløkkiliðið.

Hann varð biðin um at halda fram til ein loysn varð funnin. Men fyrsta oktober metti hann, at so mikið var fráliðið, at ein loysn átti at verið fingin á málinum. Tá so ikki var, lat hann lyklarnar til brandstøðina og -bilin saman við vaktartelefonini frá sær.

Hálvtannað samdøgur eftir hendi eitt ferðsluóhapp, sum kundi endað álvarsliga, men spældi væl av.

Og tá kom fyri dagin, at ein fyribilsloysn í tilbúgvingarskipanini er als ikki nøktandi, sigur leiðarin á Alarmsentralinum, Jón Klein Olsen, varapolitiinspektørur.



*Ein bilur við tveimum ungum gentum rendi á hendan steinin við Vatnavegin í Vágum sunnunáttina. Um illa vildi til, kundu tær endað á vatninum, og so kundi ein størri vanlukka verið hend*

*Mynd: Edvard Joensen*